


**_Nr. 21_** **_10. oktober 2021_** **_81. árg._**

# Bíblian og góð heilsa

*„Spakført hjarta er lív likamsins, men illsinni
er rot í beinunum.“ Orðt. 14,30 V.D.*

Tey síðstu hálvthundrað árini hava læknar skilt og lagt dent á sambandið millum sálarliga og kropsliga heilsu. Men Bíblian talaði um tað fyri meir enn 3000 árum síðani, tá ið Sálomon kongur gav okkum hesi fýra orðtøkini:

**1.** „Spakført hjarta er lív likamsins, men illsinni er rot í beinunum.“ *V.D. Orðt. 14,30.*
**2.** „Ljóst eygnabrá gleðir hjartað, góð tíðindi geva merg í beinini.“ *Orðt. 15,30.*
**3.** „Mild orð eru sum rennandi hunangur, sálini søt og likaminum heilsubót.“ *Orðt. 16,24 V.D.*
**4.** „Glatt hjarta gevur heilsubót góða, men dapur hugur fær beinini at visna.“ *Orðt. 17,22.*

Vit kunnu taka samanum hesi skriftstøð og siga: At hava ein trúgvandi hugburð (leggja dent á tað, sum er gott staðin fyri tað, sum er ringt), látur (evnini at gleða seg) og uggandi orð hava eina djúpa ávirkan á tína heilsu (og á tey menniskju, sum eru kring teg).

Hvat er móteitur ímóti strongd? Sálarfriður! Hvat hjálpir móti ótta? Trúgv! Og hvaðani koma sálarfriður og trúgv frá? Gudi!

Dávid var heilt illa fyri, tá ið hann skrivaði: „Hvat gagn er í mínum blóði, tá ið eg fari niður í grøv?“ (Sálm. 30,10). Vit vita ikki, um hann var sálarliga strongdur, ella um hann var kropsliga sjúkur. Men Gud legði uppí, og seinni í sama Sálmi

skrivaði Dávid: „Tá mína sorg tú til gleðidans vendi, lætst meg úr mínum sorgarbúna og klæddi meg í gleði, at sál mín skal syngja tær lov og ongantíð tagna; Harri, mín Gud, allar ævir eg vil tær lova!“

Tað er eingin ivi um hetta: tín máti at hugsa ávirkar meir og meir tína heilsu!

*„… et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Hvaðani fært tú lønina?

*„Eingin kann tæna tveimum harrum; tí at annaðhvørt vil hann hata annan og elska annan, ella vil hann halda seg aftur at øðrum og vanvirða annan. Tit kunnu ikki tæna Gudi og mammon.“ Matt. 6,24.*

Billy Bray var ein av ringastu brennivínsmonnum. Hann var sokkin so djúpt, sum hugsast kann. Men so varð hann umvendur, og hann var íðin í kristindómi sínum og ferðaðist runt í Cornwall í Onglandi og prædikaði. Hann var ein ógvuliga avhildin prædikumaður, og hansara prædikur líktist ikki prædikunum hjá øðrum tá á døgum. Hann brúkti nógv myndir ella hendingar úr gerandisdegnum at lýsa tað, hann ætlaði sær at siga.

Einaferð prædikaði hann á einum staði, har tvey kolanám vóru tætt við hvørt annað. Í øðrum náminum vóru arbeiðsviðurskiftini góð, og lønin var eisini góð. Í hinum náminum var arbeiðið ógvuliga strævið, og lønin var vánalig.„Hvat nú,“ segði Billy av prædikastólinum, „um eg arbeiði í tí vánaliga náminum, men tá ið lønardagurin kemur, fari eg yvir til hitt námið og vil hava løn mína útgoldna haðani?

„Íðan,“ spyrja teir meg, „hevur tú ikki arbeitt eina aðrastaðni?“

„Jú, men eg vil heldur fáa lønina frá tykkum.“

„Tað ber ikki til! Tú mást eisini arbeiða har, sum tú vilt fáa lønina útgoldna,“ var svarið.

Soleiðis fáa menniskju lønina har, sum tey tæna,“ endaði Billy, „annaðhvørt frá djevlinum ella frá Jesusi.“

Teologiskar spurningar greiddi hann á sín egna skilagóða hátt. Einaferð, tá ið hann prædikaði fyri nøkrum atfinningarsomum fólkum, segði hann frá prædikastólinum: „Tit eru

ikki til helvtar so klók sum dunnurnar heima í túninum hjá okkum. Tá ið vit blaka ein neva av korni út til teirra, so eta tær alt kornið, men agnarnar lata tær liggja. Men tá ið tit fáa korn, so heinta tit allar agnarnar og lata kornið liggja.“

Billy Bray andaðist stillisliga 25. mai 1868. „Æra veri Gud!“ vóru seinastu orð hansara.

*„Kongesønnen eller Billy Bray“* – *Effie Campbell* umsetti.

# Einsamallur

Eg vil siga nøkur lívgandi orð til tín, sum ert einsamallur. At vera einsamallur nýtist ikki endiliga at vera á tann hátt, at eingi onnur eru rundan um teg. Vit kunnu vera einsamøll, sjálvt um vit eru saman við øðrum. Serliga ein trúgvandi kann kenna seg einsamallan, um vit eru saman við øðrum, sum ikki trúgva – og kanska spotta okkara trúgv. Hetta kann vera bæði í familjuni, í grannalagnum og á arbeiðsplássinum.

Men sum eitt trúgvandi menniskja mugu tú og eg ONGANTÍÐ, ONGANTÍÐ gloyma hesi orðini frá Jesusi í Hebr. 13,5: **„Eg skal als ikki sleppa tær, og á ongum sinni fara frá tær!“** Og síðstu orð Jesusar til okkara í Matt. 28,20 ljóða: **„Eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda.“** Hesi lyfti kunnu ikki stigbendast ella misskiljast.

Men vænta vit altíð, at Guds lyfti skulu merkjast í okkara kenslum, kann tað enda við, at vit merkja tað øvugta: „Gud er farin frá mær!“ Men tað er Hann IKKI. Tað KANN Hann IKKI. Tí so hevði Hann svikið lyfti síni og …

**LYFTINI KUNNA EI SVÍKJA,**
ævigt tey standa fast.
Jesus hvørt orð hevur prógvað,
tá ið hans hjarta brast.
Himmal og jørð kann brenna,
bergið í havið renna,
men tann, sum trýr, skal kenna:
**LYFTINI VIKAST EI!**

Lívið hevur bæði góðar og ringar kenslur við sær. Kenslurnar kunnu lyfta meg næstan upp til Himmals, og eg sveimi gjøgnum lívið – aðrar kenslur kunnu balla meg inn í eitt svart skýggj av fordøming og einsemi. Men vit trúgvandi liva í TRÚNNI.

Jesus hevur sagt: Eg skal als ikki sleppa tær, og á ongum sinni fara frá tær!“ – „Eg eri við tær allar dagar alt til veraldar enda!“

Tí siga vit við frímóði: „HARRIN ER HJÁLPARI MÍN – TÍ VIL EG IKKI ÓTTAST! HVAT KANN MÆR MENNISKJA GERA?“ Hebr. 13,6.

*Effie Campbell* umsetti.

## Fýra orð til umhugsanar

Fyri nøkrum árum síðani sat eg í einum bussi, sum koyrdi gjøgnum gøturnar í London. Tá sá eg ein mann, sum gekk og sópaði gøtur. Hann bar eitt stórt skelti á rygginum. Á tí stóð: Uttan Gud - eingin vón.

Sama árið sá eg uppi í Skotlandi eina broderaða mynd hanga á einum stovuveggi. Har stóð: Fyrireika teg at møta Gudi tínum. Heim aftur komin sá eg hetta sama orðið í Bíbliuni. Tað stendur í Ámos 4,12.

Einaferð sá eg niður í Bíbliuna hjá einari danskari lærarinnu. Á fremstu opnu stóð: Henda bókin vil halda teg burtur frá syndini, ella vil syndin halda teg burtur frá hesi bók.

Bíblian er vindeygað, har tú sært Harra tín ígjøgnum.

*Effie Campbell.*

## Fýra spurningar

**1.** Hvussu brúki eg tíðina?
**2.** Hvat brúki eg pengarnar til?
**3.** Hvussu brúki eg míni evni?
**4.** Hvussu brúki eg møguleikarnar?

*e.c.*

---

Nógvar meinigheitir eru heftar av innanhýsis ósemjum og stríðum, so tær fáa ikki stundir at vísa heiminum Jesus.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

### SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 10. okt. | Tekstur: | Matt. 6,12; 18,21–35 | bíbliuorð: | Ef. 4,32b |
| 17. okt. | Tekstur: | Matt. 6,13a; 4,1–11 | bíbliuorð: | 2 Tess. 3,3 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 22* *24. oktober 2021* *81. árg.*

# Jesus er Guds sonur

*„Eg orð tíni goymi í mínum hjarta, fyri at eg ikki skal synda móti tær.“ Sálmur 119,11.*

Ein gomul kona segði mær, at hon hevði havt vitjan. Gesturin var ein yngri kona, sum øll síni vaksnu ár hevði búð í útlondum. Tær prátaðu saman, og hin eldra konan helt seg skilja, at tað stóð ikki so væl til andaliga við hinari. Hon spurdi hana so: „Trýrt tú á Gud?“

„Tað eru so nógvir gudar til,“ físti hin. „Nei,“ svaraði hin gamla, „tað er bara ein Gud, men nógvir avgudar.“

„Íðan, trýrt tú so ikki, at tað eru stjørnurnar, ið stýra lívi okkara?“ spyr hin yngra.

„Nei, sjálvandi ikki. Vit skulu seta álit okkara á Skaparan og ikki á skaparverkið. Stjørnurnar eru skaptar tað sama sum tú og eg, og tær kunnu einki gera.“

So var kvirt eina løtu. So sigur hin yngra: „Heldur tú ikki, at Jósef var pápi Jesusar?“

„Nei, tað haldi eg sjálvandi ikki,“ svaraði hin gamla, „Og eg kann gott siga tær, hví eg ikki haldi tað. Fyri tað fyrsta stendur tað, at tað kendist á henni, áðrenn tey komu saman, at hon var við barn.

Fyri tað næsta ætlaði Jósef at sleppa sær av við hana, alt av somu grund. Men eingil Harrans sýndi seg fyri honum í dreymi og segði honum, hvussu alt hetta var hent.

Fyri tað triðja stendur tað, at Jósef kom henni ikki nær, fyrr enn hon hevði átt sonin. Øll hesi trý skriftbrotini vísa, at Jósef

kundi ikki vera pápi hansara. Harafturat skal eg siga tær, at frá tí, at Jesus stóð fyri ráðnum, og til hann reis uppaftur, gingu 30 profetiir í Gamla Testamenti út við honum. Hetta vísir okkum, at hann var hin lovaði Messias.“

Skulu vit hava slíkan vísdóm, sum henda gamla konan hevði, at svara fólki aftur, so krevur tað, at vit geva okkum stundir at lesa í Guds orði og aftaná í kvirru hugsa og grunda um tað. Men tað tykist, sum Maria við Jesu føtur er eitt útdeytt fólkaslag. Og tað er stórt spell, tí Guds orð er hitt livandi vatnið, sum sløkkir tostan í sál okkara. Í Sálmi 119 – tí longsta av Dávids sálmum – vers 11 lesa vit: „Eg orð tíni goymi í mínum hjarta, fyri at eg ikki skal synda móti tær.“

Hetta er uppskriftin at standa ímóti syndini. So latið okkum fylla okkum við Guds orði.

*Effie Campbell.*

# Á fyrstu og síðstu bløðunum

Á fyrstu bløðunum í Bíbliuni lesa vit, hvussu Gud skapti himmal og jørð. Á síðstu bløðunum lesa vit, hvussu hann skapar himmal og jørð av nýggjum.

Í byrjanini lesa vit, hvussu Djevulin oyðileggur lívið og friðin hjá menniskjum, og hvussu syndin og deyðin komu inn í verðina.

Í Opinberingini, síðstu bókini í Bíbliuni, síggja vit, at Djevulin verður blakaður í eldsjógvin, syndin og deyðin verða fyribeind. Í byrjanini verður frelsan játtað okkum menniskjum, og allar bøkurnar í Bíbliuni greiða okkum frá, hvussu frelsan verður fyrireikað og framd.

Í síðstu bókini er frelsan fullførd.

*Effie Campbell* umsetti.

# Set ikki smásteinar staðin fyri Gud

Mong vilja hava Andans gávur, Guds gávur, men leggja einki í gevaran. Bíblian sigur okkum skilliga og greitt: „Hvør ein góð gáva og hvør ein fullkomin gáva er omanífrá og kemur niður frá faðir ljósanna.“ Ják. 1,17.

Ein norðmaður greiddi soleiðis frá á einum Oasemøti á Visjon Norge: „Eg var farin út í fjøllini at biðja. Eg legði meg

á knæ niður við ein stein, blundaði og fór undir at biðja. Nakað seinni læt eg eyguni upp og sá einar renniskógvar standa á steininum. Eg bleiv rættiliga kløkkur. Eg hugdi longur upp og sá eina konu standa ovast á steininum. Hon greiddi mær frá, at hon var healari, og at hon grøddi fólk við kraftini í smáum steinum. Nú var hon so útlúgvað, at hon mátti koma út í náttúruna at savna sær orku. Hon vísti mær lummarnar, sum vóru fullir av smásteinum, og nú skuldu so hon og steinarnir fáa nýggja kraft, tí sera sterk „aura“ var her.

Hatta er New Age, tann reini heiðinskapur. Latið okkum, sum trúgvandi eru, vísa á kraftkelduna, sum er Gud, og sum bara gevur góðar og fullkomnar gávur. Alt annað er ein eftirlíkning. Latið okkum ikki vera eitt fikutræ, sum onga frukt ber. Heldur tú teg bara hava eina talent, sum tú hevur grivið niður, far so og grava hana uppaftur og pakka hana út úr turriklæðnum og far út og brúka talentina, tí Harrin hevur givið øllum talentir, so at tey hava nokk.

*Effie Campbell.*

# Sorg

*„... tá eru sorgardagar at enda.“ Jes. 60,20.*

Onkuntíð í 1890-árunum var tað ein kona, sum búði í eini lítlari bygd norðanfjørðs í Føroyum. Hon misti ein 7–ára gamlan drong. Hann doyði av sjúku – helst var tað av hálsbruna. Tá var eingin heilivágur. Henda mamman átti fleiri onnur børn; men hon syrgdi so heilt ræðuligt, at hon legðist í songina.

Eina náttina droymdi hon, at hon sá upp í himmalin. Har flugu fleiri einglar. Hon kendi ongan teirra. Teir tóktust at spæla og stuttleika sær óført. Nakað væl aftanfyri kemur ein eingil flúgvandi, og flýgur hann sera tungliga. Tað var sonurin. Hon kendi hann beinanvegin.

„Jamen, góði, hví flýgur tú so tungliga? Hví spælir og stuttleikar tú tær ikki saman við hinum?“ spurdi mamman. „Mamma, tað eru tínar sorgir, sum tyngja meg niður. Eg kann ikki spæla og stuttleika mær her, tá ið tú gongur har niðri og syrgir,“ svaraði hann aftur, og tá vaknaði mamman.

Men hesin dreymur, sum hon tók sum eini boð frá Harranum, styrkti hana so væl, at hon fór undir at liva sítt vanliga lív aftur.

Tað er so mangt, sum er so ófatiligt fyri okkum, og vit standa spyrjandi: „Hví skuldi hatta og hetta nú henda?“ Men Jesus sigur við okkum, sum hann segði við Pætur: „Tað, sum eg geri, skilir tú ikki nú; men seinni skalt tú skilja tað.“ Jóh.13,7. Vit mugu trúgva, at alt er til tað besta fyri okkum, og Harrin bjóðar okkum at koma til sín: „Kastið alla sorg tykkara á hann; tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum.“ 1. Pæt. 5,7. Hitt trúfasta hjartað vil altíð sakna. Tað er natúrligt, eitt pláss stendur jú tómt. Vit mugu kasta sorgina á Harran og biðja hann um at fylla tað tóma plássið.

Henda mamman átti ein skatt í himli og tí nakað at stremba fram ímóti, og tað mugu vit øll gera, til vit eru har, sum ongin sorg er til. Opb. 21,4.

*Effie Campbell.*

---

# Mótvindur

Um tú tosar við onkran í nógvum mótvindi, so mást tú venda tær á, fyri at viðkomandi kann hoyra teg.

Men tosar tú við Gud, tá ið tú ert í nógvum mótvindi (í stórum trupulleikum), so er ikki neyðugt hjá tær at venda tær á. Hann hoyrir teg.

*e.c.*

---

Gud gav tykkum ikki børn, so at tit skuldu lata tey upp í hendurnar á fíggindanum. Paulus segði, at tað slagið av trúgv, sum hann fann í Timoteusi, hevði hann fyrst sæð hjá mammu og ommu hansara, og tær vóru báðar giftar við vantrúgvandi monnum. Hvussu í verðini kundu hesar kvinnur varðveita trúnna? Tær hildu seg til vínstokkin og blómaðu í fíggindaligum umhvørvi.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24. okt. | Tekstur: 1 Kong. 18,1–46 Opb. 4,11 | bíbliuorð: | Opb. 19,6b–7a |
| 31. okt. | Tekstur: 1 Mós. 1,1–2,4 | bíbliuorð: | Sl. 33,6 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74